# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Realskúlaflokkur í 1965

Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007.

Ein realskúlaflokkur í 1965. Myndin er tikin við skótahúsið við Hoydalsvegin.

**Aftara rað f.v.:** Echardt Persson, Grethard Poulsen, Kartin Simonsen, Bergur Djurhuus, Regin Hentze, Kári Jón Hansen, Óli Petersen, Jógvan við Ánna, lærari, Torkil Holm Petersen, Birgir Mortensen, Steingrím Abrahamsen, Bogi Mikkelsen og Ólavur Michelsen

**Fremra rað f.v.:** Rannvá Lindarstein, Maria Mortensen, Durid Reinert, Bette Johansen, Sigrun Joensen, Anna Katrina N. Joensen (Dukki), Brenda Thomsen, Katrin Reynheim og Hergerð Krossteig

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 497)

*Myndaeigari: Anna Katrina Olsen*



## Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg
á 80 ára degnum.
Takk fyri blómur, vitjan, fjarrit,
og telefonuppringingar.
Takk øll somul, sum gjørdu mær
dagin ógloymandi.
Harrin signi tykkum øll.

**Ketty Thomassen**

†

**Kristense Gåsland**
fyrrverandi trúboðari í Betania í Skopun

andaðist mánadagin 29. sept., 94 ára gomul

Jarðarferðin verður frá samkomuni Klippen Bremnes, Noreg fríggjadagin 3. okt. kl. 12 norsk tíð.

**Samkoman Betania**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ernst Wesenberg Samuelsen**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Hoyvík, andaðist á Landssjúkrahúsinum 29. september, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Torbjørg Jacobsen, Nólsoy**, andaðist í heiminum sunnudagin, 65 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Benrosa Joensen, Klaksvík** andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi sunnudagin 28. september, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Hósdagin 25. september, andaðist í Hirtshals **Marni á Lakjuni**, 57 ára gamal.

**Dagurin**
**1. oktober. Remigius**, deyður í 533. Galliskur aðalsmaður, sum longu 22 ára gamal varð valdur til biskup í Reims. Hann kristnaði Chlodovech kong, sum var langabbi Karlamagnus. Remigius doyði 96 ára gamal.